## 200 í Café Natúr

Føroya best dámdi punk bólkur 200 spælir í kvøld á Café Natúr. Hetta verður eitt høvi til at hoyra ein av ársins bestu livebólkum eina seinastu ferð í ár.

2005 hevur verið eitt frálíkt ár fyri 200, við ovastu rók bæði á sølulistanum hjá 3'aranum og á 15 teimum bestu í fleiri vikur, og fantastiskum konsertum bæði úti og heima. Bólkurin hevur gjørt var við seg, bæði á tónleikapallunum og í miðlunum, ikki minst í kjakinum um sangin "Musclemanblað", ið summi halda ganga ávísum tingmanni ov nær.

**nud**

# Sjey uppskot til Cavlingvirðislønina



**Sjey journalistiskar søgur eru í uppskoti til høgt mettu Cavlingvirðislønina. Millum uppskotini eru sendingar, greinarøðir og ein bók**

Tað er Cavlingnevndin í Dansk journalistforbund, sum skal gera av, hvør fær virðislønina, ið verður mett at vera størsti danski journalistheiðurin yvirhøvur.

Uppskotini eru hesi:
Thomas Saneborg og Niels Sandøe á Jyllandsposten fyri avdúkingar um maktmisnýtslu í tryggingarfelagnum Codan

Lars Olsen fyri bókina "Det delte Danmark" um fleiri ára miseydnaðan integratións-, skúla- og íbúðarpolitikk

Christian Andersen og Michael Klint fyri DR dokumentarsendingina "Hævet over mistanke" um vantandi vilja hjá mynduleikunumum at kanna ein deyðstilburð í samband við politihandtøku.

Tom Heineman og Morten Hansen fyri geinarøð í Fakblaðnum 3F um umhvørvisdálkingina hjá statsfíggjaðum donskum svínagørðum í Polen

René Gummer, Pernille Stensgaard og Henrik Winther á Weekendavísini fyri greinarøð um lívsins gongd á Ríkissjúkrahúsinum

Tino Pedersen, Lars Teilgaard og Claus Kræmmergaard á Nordjyske Medier fyri avdúking av chikanu og samstarvstrupulleikar á Politigarðinum í Hjørring

Christoffer Gulbrandsen fyri DR dokumentarsendingina "Lykketoft Finale" um miseydnaða valstríðið hjá fyrrverandi formanninum í sosialdemokratiska flokkinum

Vinnarin verður kunngjørdur 4. januar

**ave**

www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum




Blaðfólk

Á redaktión okkara er spennandi, avbjóðandi og fjølbroytt starv sum blaðfólk leyst.

Starvið fevnir fyrst og fremst um at røkja uppgávur á høvuðsredaktiónini í Vágsbotni. Hartil er ynskiligt, at viðkomandi eisini røkir aðrar uppgávur kring landið. Fyrst og fremst í Norðoyggjum.

Vit hugsa okkum, at tú skalt byrja í starvinum um 15. januar, men er tað ynskiligt, er møguleiki eisini at byrja fyri hetta. Er talan um rætta umsøkjaran, kunnu vit eisini bíða til 1. februar.

Við rokna við, at tú er ein persónur við áræði at fara undir nýggjar uppgávur, har tað ofta ræður um at skjótt at kunna seta seg inn í tey viðurskifti, sum talan er um. At tú ert uppsøkjandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt undir eini ásettari tíðarfreist.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving hava fyrimun, men er hetta ikki nøkur treyt fyri starvssetanini.

Lønin er sambært avtalu millum Blaðútgevarafelagið og Blaðmannafelagið.

Er ynskiligt at frætta nærri um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller, blaðstjóra, á tlf. 341800. Ella við at senda teldupost á jan@sosialurin.fo

Seinasta freist at søkja starvið er 31. desember 2005, og skulu umsóknir við viðkomandi upplýsingum sendast til:

Sosialurin
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umfram tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.

# Løgmansrøðan send í Danmark

**Nýggjársrøða løgmans verður eisini send í Danmark**

NÝGGJÁRSRØÐA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Fyri fyrstu ferð verður nýggjarsrøða løgmans send í donskum sjónvarpi – tekstað á donskum, so bæði føroyingar í Danmark og danir kunnu fylgja við*

Sum nakað nýtt, fáa føroyingar búsitandi í Danmark - og danir nú høvi at síggja nýggjársrøðu løgmans í donskum sjónvarpi.

Nýggjársrøða løgmans verður sum vanligt send nýggjársaftan í Kringvarpi Føroya klokkan 19. Harumframt verður hon send 1. januar á donsku rásini DK4. Her verður røðan við donskum undirteksti, og hon verður send klokkan 22.40.

Tað er danska sjónvarpsrásin, sum hevur biðið um at sleppa at senda røðuna, og tað halda vit sjálvandi vera eitt frálíkt hugskot, sigur Bjørt Samuelsen, kunningarráðgevi á Løgmansskrivstovuni.

Tað verður løgmansskrivstovan, sum syrgir fyri, at nýggjársrøðan verður send við donskum undirtekstum, og verður hetta gjørt í samstarvið við Kringvarpið, sum eisini syrgir fyri, at DK4 fær sendingina klára at senda.

Nýggjársrøðan verður hesaferð tikin upp fríggjakvøldið – kvøldið fyri nýggjársaftan.

Vit vilja royna at fáa hana so ferska, sum gjørligt. Í fjør var hon tikin upp triðja jóladag – dagin eftir flóðalduna í Indiska havinum. Men tá røðan varð send, varð vanlukkan vorðin so nógv álvarsamari, enn hildið var, tá røðan varð tikin upp, sigur Bjørt Samuelsen, sum roknar við, at hetta er komið fyri at vera, at røðan verður send í Danmark.

Hesaferð er tað DK4, tað kann sjálvandi vera onkur onnur støð, sum vil senda hana næstu ferð – og hetta hevur stóran týdning, tí tað búgva so nógvir føroyingar í Danmark, sigur hon.